# Býráðsvalið 2000



**Arnbjørn Madsen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins*

Í seinastu valgrein míni vísti eg á, hvørji mál eg vildi arbeiða fyri á Argjum, um eg bleiv valdur.

Nú fari eg at umrøða Havnina. Hvørji mál eg her vil arbeiða fyri.

### Bústaðarviðurskifti

Tað er nú einaferð so, at ikki øll megna ella ynskja at byggja egin hús. Tí mugu skapas fyritreytir fyri øðrum bústaðarmøguleikum. Ein møguleiki er, at bygdar blivu fleiri íbúðir, sum fólk kundu leigað. Eldri fólk sum eiga stór hús, og sum kundu hugsa sær eini minni ístaðin, høvdu kunna loyst henda trupulleika við at selt hús síni, og leiga eina íbúð ístaðin. Hesin leigusáttmáli skuldi tryggja teimum ein bústað so leingi tey livdu. Hetta hevði eisini ført við sær, at mangar ungar familjur høvdu kunna loyst sínar sethúsar trupulleikar skjótari, og kanska bíligari, enn ídag!

Fyri at gjørt hesar íbúðir meiri áhugaverdar, skuldi tað verðið møguligt hjá ungum familjum at leiga nakrar av teimum.

### Náttúra og umhvørvið

Ólavur Mikkelsen, sáli, arbeiddi sera hart fyri at varveita teir grønu blettirnar teigarnar í Havn. Spell at ikki fleiri tóku undir við honum, tí so høvdu funnist fleiri grønir teigar í Havnini ídag. Tøkk fái hann fyri tað.

Í Havnini finnast alt ov fáir grønir blettir eftir, og tí má ansast væl eftir, at ikki teir síðstu fara undir betong og asfalt.

Ein skinsamur politikkur á hesum øki skal sjálvandi galda fyri alla Tórshavna Kommunu.

# Lærarin & Skúlin



**Johan Mortensen**
*Valevni fyri Tjóðveldisflokkin*

Abbi mín var lærari. Pápasystur mín var eisini lærari. At vera lærari er eitt sera álvarsamt og krevjandi starv. Hjá mongum var hetta fyrr eitt veruligt kall, eitt starv við meining og innihaldi. Tíðanverri er tað ídag hjá mongum lærarum reducerað til eitt meira ella minni undirbetalt stressjobb.

Øll minnast vit okkara fyrstu lærarar og tað stóru ávirkan teir høvdu á okkum, eina ávirkan fyri lívið.

Fyri at ein lærari skal virka til fulnar krevst at hann hevur rímuligar umstøður at virka undir, bæði fíggjarliga og umhvørvisliga.

Børn okkara skulu hava nøgdar lærarar.

Skúlaverkið í Havn krevur stórar ábøtur. Nógvir skúlar eru niðurslitnir. Eisini er tørvur á fleiri skúlum, ikki minst forskúlum og frítíðarskúlum.

Eisini hetta verður ein stór uppgáva hjá komandi Býráði at fara undir. Hon er líka týdningarmikil sum barnaansingin og okkara eldri Havnarborgarar.

Tjóðveldisflokkurin fer at loysa hesi mál á ein sømuligan og kostnaðarforsvarligan hátt.

# Politisk svartaspilla

**Kaj Vágfjall**



Í Dimmalætting nr. 203 skrivar Lisbeth L. Petersen løgtingslimur eina grein við heitinum: »Skulu vit trúgva teimum?«. Yvirskriftin sigur alt. Her skal ivi sáðast um nakað, og uttan at ein hevur lisið greinina, gerst ein frammanundan greiðir yvir, at ivin sjálvandi skal sáðast um trúvirði føringa – hennara egnu landsmenn.

### Fer blokkurin at minka?

Tað sum málið her snýr seg um, er um tað er satt, at danskir politikarar hava hótt føroysku samráðingarnevndina við, at blokkstuðulin skal minkast burtur í einki í framtíðini. Hvørki Lisbeth ella undirritaði hava verið við til samráðingarnar við donsku stjórnina, og kunnu sostatt ikki vita hvat er fari fram handan leiktjøld. Men hóast tað, so havi eg álit eg á okkara egnu landsmonnum.

### Eru føringar ikki at líta á?

Slíkt álit hevur Lisbeth ikki, og hevur ongantíð átt slíkt álit á egnu landsmonnum sínum. Hon er, sum flest øll onnur sambandsfólk, bergtikin av øllum tí sum danir siga og gera, so vertin á, um tað ikki altíð er til okkara fyrimum. Føringum hava tey ikki stórvegis virðing fyri. Vit føringar skulu ikki halda, at vit eru nakað. Vit eru alt ov fáment. Kunnu einki, duga einki o.s.fr. Nei, tað eru danir sum eru naka, og sum vit skulu lata alt upp í hendurnar á. Tí einans teir duga og vita. Lat teir gera alt fyri okkum. Okkum nýtist ikki at gera nakað. Nei vit kunnu liggja í seingini og sova, til onkur kemur við einum donskum kekki og veipar yvir høvdinum á okkum og biður okkum koma til arbeiðis. Blokkurin, eigur lívið í okkum, siga tey. Um hann minkar ella fellur burtur, mugu vit arbeiða, og hetta ræðast sambands- og javnaðarfólk. At hugsa sær, missa vit blokkin, so hava vit ikki ráð til at keypa dýrar bilar og fín sterioanlegg o.s.fr. Hetta er jú tann vælfer, sum sambands- og javnaðarfólk harmast um, vit mugu vera fyri uttan. Lat danir bara gera alt fyri okkum, svara fyri okkum, gjalda fyri okkum o.s.fr., tí tað hava teir best skil fyri. Hetta er sambands- og javnaðarhugsjónin.

### Tíðindafundirnir eru sjónleikir

At danir hava latið hesi orð falla, ivist eg ikki í, tá **okkara** samráðingarfólk siga so. So mikið álit havi eg á landsmonnum mínum. At Nýrup royndi at muta ímóti á tíðindafundinum, hevur alt at siga fyri Lisbeth, men fyri mær eru hesir tíðindafundir ikki annað enn sjónleikir, har Nyrup stýrir øllum, meðan løgmaður næstan ikki sleppur til orðana – hann er jú bara føringur. Sjálvandi fara danir ikki at sita hendur í favn, meðan vit válka okkum í marglæti, partvís goldið av teimum.

### Andstøðan missrøkir skyldur sínar í uttanlandsnevndini

Tað sum fer fram handan leiktjøld veit eg sum meinigur maður einki um. Lisbeth veit tað heldur ikki. Um partamenn hennara í uttanlandsnevndini røktu sítt arbeiði og gjørdu sínar skyldur, við at møtt til fundirnar, bæði her heima og í Keypmannahavn, kundu teir ivaleyst vátta hesi tíðindi, men tað hevur helst ongan áhuga, tí tað hevði ikki hóska sambandsflokkinum at fari út og greitt veljarum sínum frá, at blokkurin fór at hvørva. Tá hevði grundarlagið undir hesum flokki falli burtur. Tað er helst tað sum ræðir tey, og tí royna tey av øllum alvi at gera okkara samráðingarfólk til lygnarar.

### Meiri álit á teimum sum hava snýtt okkum

Lisbeth hevur meiri álit á hvat danir siga. Tá vit vildu hava eina dómarakanning, sítti danska stjórnin okkum hesa kanning, tí hon hevði ikki reint mjøl í posanum. Ístaðin fyri fingu vit eina aðra kanning, sum, hóast alt, avdúkaði, at vit høvdu verið snýttir. Vit fingu endurgjald frá donsku stjórnini. Hví? Var tað tí hon var samsek við brotsmennirnar í Den Danske Bank. Fyri at tað skuldi síggja betur út, stevndi danska stjórnin Den Danske Bank. Úrslitið kenna vit. Fyri at »samspælið« millum henda banka og donsku stjórnina, sum javnaðarflokkurin er garantur fyri, ikki skuldi vera avdúkað, var »semja« gjørd, tí um málið var ført til dóms, hevði ikki staði so væl til hjá nógvum, bæði í donsku stjórnini og í bankanum.

Hetta eru fólkini, sum Lisbeth setur álit sítt á, heldur enn føringar. Og sama álit vísa javnaðarfólk dønum, og ganga teimum til handa, heldur enn sínum egnum landsmonnum. Tað sum er fari fram ta síðstu tíðina millum donsku stjórnina og landsstýrið kenna flest øll, har vit eru fóðrað við villeiðandi upplýsingum og í summum førum beinleiðis lygnum.

Hetta eru teir og politikkur teira, sum javnaðarmenn geva sín fulla stuðul til.

### Ongar fylgjur?

Jú, sambands- og javnaðarfólk kunnu billa føroya fólki nógv inn, uttan at tað fær fylgir, tá tað vísir seg, at tað ikki passar. Føroya fólk fer at svara tykkum aftur, fyrst við komandi fólkaatkvøðu, síðani til komandi fólkatingaval og at enda til komandi løgtingsval. Dómurin verður ikki mildur til hesi myrkursins góngumenn, sum dúgliga hava sáðáð svartaspillu sína og misstreysti her á landi, tí føringar hava kent nóg mikið av sviða, eyðmýkjan, háðan og niðurgering frá danska herðsetingarvaldinum og frá skutilssveinum teirra her á landi.

# Fíggjarstýringin er grundarlagið fyri einari sterkari kommunu



**Schumann Hjaltalin**
*býráðslimur.*
*Valevni fyri Sambandsflokkin*

Størsti dentur eigur at verða lagdur á fíggjarstýringina, ein neyv fíggjarstýring er grundarlagið undir øllum kommunala virkseminum. Tað hevur eydnast okkum at gjalda niður uppá skuldina, soleiðis at vit nú eru komin niður á eina álíkning, uml. 300 mió.

Skal tað eydnast okkum at verða ein sterk og góð kommuna, so er tað av allar størsta týdningi, at hava sum aðalmál, er at gerast skuldarfrí. Tá vit eru skuldarfrí, eru vit ein fræls kommuna.

Nú Kollafjarðar og Tórshavnar kommuna leggja saman, verður kommunan enn størri og vónadi verður hettar til gagns fyri báðar kommunurnar, men at kommunan gerst størri, krevur sjálvsagt at vit hava eina neyva fíggjarstýring.

Tíðin til tey stóru lyftini er ikki komin enn, men tey lyftir ið vit geva, skulu vit eisini halda.

Komandi fýra árini verða eisini strævin hjá Tórshavnar kommunu. Men við einum skynsamum fíggjarpolitikki, sum byggir á varsemi og góðum samstarvi við hinar flokkarnar í býráðnum, kunnu vit finna eitt haldgott støði.




# Sølustevnan SøluRásin 2000

## í Ítróttarhøllini á Skála 4. og 5. november



**SøluRásin 2000**

**Opið er:** Leygardagin 4. november
Kl. 15.00-22.00

Sunnudagin 5. november
Kl. 15.00-21.45

**Undirhald:**

- Magni Christiansen
- Vísumenn
- Jónsvein og Birgir
- Barnasjónleikur
- Klovnar
- Mótasýningar
- Ungdómskórið

*Vælkomin inn á gólvið!*

Frásøgumaður: Magni Poulsen